## Gamal NSÍ'ari søkti Roskilde

Ulrik Balling, sum áður hevur spælt við NSÍ, spælir framvegis fótbólt á hampiliga høgum støði, hóast tað eru fleiri ár síðani hann fór úr Føroyum. Um vikuskiftið var hann høvuðsarkitekturin handan sigurin hjá Næstved á FC Roskilde, har Atli Danielsen spælir. Ulring Balling legði upp til fyrsta málið og skoraði tað næsta, áðrenn hann var skiftur út í dystinum, sum Næstved vann 3-0. Balling, sum verður 35 ár í næstum, hevur skorað átta mál í næstbestu donsku deildini. Hinvegin knýpir tað við at skora mál hjá Atla Danielsen og teimum, sum nú einans eru trý stig frá Kolding FC, sum er liðið, ið liggur næst undir niðurflytingarmarkinum.

## LFA spældi við Erling

Fyri einaferð skyld bar til hjá mótstøðuliðnum at spæla við Erling Jacosben, skrivar heimasíðan hjá Vanløse, eftir sigurin á LFA um vikuskiftið. Teir eru tó skjótir at leggja aftrat, at Erling Jacobsen hevur verið skaddur í eina tíð og nústaðni er við at koma seg so nøkunlunda. Gøtumaðurin var tó ikki verri fyri enn so, at hann spældi allan dystin á tamb í verjuni, har einki mál kom í gjøgnum. Í hinum endanum á vøllinum stríddist Páll Klettskarð til tað restaðu tíggju minuttir og hann varð skiftur út. Vanløse liggur nummar níggju í deildini, men hevur einans trý stig upp til sætta plássið, nú tað resta fýra umfør í triðbestu donsku fótbóltsdeildini.

# Klæmint á blettinum

**VODAFONEDEILDIN** Kjansir vóru til nógv mál, tá NSÍ tók ímóti B71 við Løkin í gjár. Men bjargingar frá báðum málmonnunum, umframt óneyvar álopsroyndir, forðaðu hesum. Undantakið var Klæmint A. Olsen, ið skoraði bæði málini í fimta sigrinum á rað hjá NSÍ

Hilmar Jan Hansen

| | |
|---|---|
| NSÍ | 2 |
| B71 | 0 |

Formkurvan hjá teimum gulu í Runavík sær ikki út til at vikna. Í gjár vann NSÍ fyri fimtu ferð á rað, og hóast seinni hálvleikur kanska ikki var tað stóra at reypa av, so vísti liðið í fyrra hálvleiki fleiri ferðir tað góða spælið, ið hevur eyðkent teir fýra undanfarnu dystirnar.

Men hóast avrikið síðstu trý korterini ikki var meira enn næstbest, var uppgávan loyst upp á tann mátan, tey flestu helst høvdu væntað frammanundan, tí NSÍ vann dystin og fekk trý stig aftrat upp í leypin. Eingin ivi var um, hvat av liðunum var tað betra, men fyri tað smæddist B71 nú heldur ikki burtur.

Eitt nú hevði Andras Gango bæði tvær og tríggjar ferðir brúk fyri at vísa síni bestu kynstur í NSÍ-málinum, eins og starvsfelagin í hinum endanum, Bárður Johannesen, eisini við fleiri bjargingum gjørdi sítt til, at B71 ikki fekk eitt størri tap ímóti sær.

Teirra partur lá ikki eftir, men kanska fleiri av teimum, ið fingu kjansirnar, aftaná mundu iðra seg um vantandi neyvleika í avgerandi løtunum. Báðir partar raktu málkarmarnar, og fleiri royndir blivu so illa hagreiddar á vegnum, at tær ongantíð bóru boð í bý, men endaðu við ongum.

### Tvær ferðir Klæmint

Stóra undantakið í dystinum, tá tað snúði seg um at fáa nakað burtur úr sínum møguleikum, var 19 ára gamli rituvíkingurin, Klæmint A. Olsen, ið eina ferð í hvørjum hálvleiki var á rætta staðnum til røttu tíð, so hann fekk skorað bæði málini í 2-0 sigrinum.

Christian Høgni Jacobsen var upphavsmaðurin til fyrra málið, ið kom ein góðan hálvan tíma inni í fyrra hálvleiki. Samanspæl frameftir í høgdu síðu endaði við, at Christian Høgni misti bóltin, men treiskur taklaði hann vinstra B71-bakkin, Tummas Clementsen, og fekk lagt bóltin hart og flatt innfyri, har Klæmint fekk smoygt sær fram um miðverjarnar hjá gestunum og við fremru stong kundi skora trygt úr stuttari fjarstøðu.

Seinna málið var uppaftur meira eitt dømi um týpiskt spæl hjá einum árvaknum framherja. Einar T. Hansen, ið fleiri ferð í dystinum hevði hug at bjóða av langt frammi á vøllinum, sendi bóltin høgt innfyri úr vinstru síðu. Inni í B71-brotsteiginum royndi annar av miðverjunum at toyggja seg, men gjørdist ov stuttur. Tá var Klæmint longu byrjaður at renna og slapp púra leysur innan fyri allar, so hann kundi senda bóltin millum beinini á Bárði Johannesen, ið kom leypandi út ímóti.



**TVÍMÁLSSKJÚTTI**

*Tveymálskjúttin Klæmint Olsen og NSÍ fegnast, meðan Bárður Johannesen og B71 irða seg*

*Mynd: Hilmar Jan Hansen*

### Ymsar avbjóðingar

Hesi bæði málini avgjørdu dystin, ið eftir hetta bleiv spældur alsamt meira eftir dagsskránni hjá B71, ið royndi at fáa minkað um munin. Fyri tað nógva hevði NSÍ gott tamarhald á, men nakrar ferðir vóru boð eftir teimum gulu. Ikki minst var einmansherurin hjá B71, Símun Hansen, ein støðug hóttan har frammi, og millum annað sendi hann eitt fríspark á tvørtræið og syrgdi annars fyri at halda Andras Gangi í málinum heitan.

Sum sagt, var hetta fimti sigurin á rað hjá NSÍ, sum nú hevur bart seg upp á triðja plássið. Í teimum fýra undanfarnu hevur NSÍ hvørja ferð vunnið á liðum, ið vóru omanfyri á stigatalvuni – og hevur yvirhálað tey. Hetta síðsta bar av góðum grundum ikki til í gjár, men spennandi verður at síggja, um runavíkingar taka táttin uppaftur friggjakvøldið, tá teir skulu til Fuglafjarðar at spæla ímóti ÍF, sum er nýggja oddaliðið í Vodafonedeildini.

B71 er framvegis niðan fyri strikuna, men datt eisini niður á aftasta plássið, nú AB vann á FC Suðuroy. Sostatt hava øll trý liðini seks stig, og nógv bendir á, at stríðið um áttanda plássið, ið er evsti yvirlivingarmøguleikin, fer at standa millum hesi. Gamaní, tapti B71 hesa ferð, men liðið gjørdi sær á ongan hátt fyri skommum í Runavík, so spennandi verður eisini at fylgja sandoyingum í komandi dystunum.

*hilmarjan@sosialurin.fo*

## Hart arbeiði, so kemur tað

Tá tvífaldi málskjúttin hjá NSÍ í gjár, Klæmint A. Olsen, átta minuttir fyri tíð var skiftur út við Károly Potemkin, kundi hann fara av vøllinum við góðari samvitsku, tí hann hevði – sum tann einasti – rakt málið í 2-0 sigrinum á B71.

– Fyrra málið kom eftir forarbeiði hjá Christian Høgna Jacobsen, so har var bara at seta hann inn. Tað seinna kom eftir eitt innlegg, sum fór upp um verjuna hjá teimum, og so fekk eg akkurát prikað bóltin fram við teirra málverja, staðfesti Klæmint, ið helt stóran mun vera á hálvleikunum báðum.

– Fyrri hálvleikur var rættiliga góður og tá spældu vit væl. Har vóru eisini nógvir kjansir. Men tað dovnaði eitt sindur eftir steðgin, og serliga eftir at vit fingu tað seinna málið.

Spurdur, hvat hann heldur vera orsøkina til, at NSÍ miðvíst hevur strítt seg av aftasta plássi upp á triðja pláss síðstu fimm dystirnar, heldur Klæmint tað vera torført at nevna nakra ávísa orsøk.

– Eg veit ikki, hvat eg skal siga til tað, tí vit hava arbeitt hart allar dystirnar, og tá vit gera tað, so kemur tað nokk fyrr ella seinni. Persónliga eri eg nøgdur við, hvussu tað hevur gingist, og serliga eri eg fegin um, at eg havi fingið so nógva spælitíð, segði Klæmint A. Olsen eftir dystin.

*hilmarjan@sosialurin.fo*